# SAVNSFAGNAÐUR 2010

Býarbókasavnið

Teknikappingin fyri børn **“Eygleið, tekna og gev víðari”**

## Tekna eina eygleiðing og vinn eina bók

Øll børn frá 2 til 11 ár kunnu vera við.

1. bólkur: 2 – 5 ár
2. bólkur: 6 – 9 ár
3. bólkur: 10 – 12 ár

Lat eyguni upp, ver forvitin. Heimurin er fullur at stuttligum lutum og merkisverdum tilburðum. Eygleið teir, tekna teir og gev teir víðari.

**Tekna tað tú sært,**
**sum tú hevur lært,**
**skip og bátar, fólk og flugur,**
**ja, tekna alt tað, sum tú dugir,**
**og kemur ljóð inn í títt oyra,**
**so tekna tað, ið tú kanst hoyra,**
**ommu ella bamsu mjúka,**
**nógvar litir tú kanst brúka.**



## Kappingar-info:

- Teknað verður á A4-ark.
- Skriva navn, bústað, aldur og telefonnummar **aftanfyri** á myndina.
- Tekningarnar skulu sendast til Býarbókasavnið, Boks 358, FO-110 Tórshavn í seinasta lagi 30. september 2010. Merk brævbjálvan: Savnsfagnaður 2010.
- Les meira á www.snar.fo/savnsfagnaður og á www.bbs.fo.
- Spurningar kunnu sendast samskiparanum á rakel.helmsdal@gmail.com

Vinnararnir verða kunngjørdir á tiltaki á Savnsfagnaðinum fríggjadagin tann 15. oktober 2010. Útvaldar myndir verða sýndar fram í framsýning.

Tórshavn 25. august 2010

**Samskipari**
**Rakel Helmsdal**

---

Savnsfagnaðurin 2010 verður fyriskipaður av hesum stovnum:
Náttúrugripasavnið, Jarðfeingi, Sjósavnið, Listasavnið, Fornminnissavnið, Skúlabókagrunnurin og Landsmiðstøðin